## Noreg hevur takið á Brasil

Morten Gamst Pedersen skelkaði Brasil, tá hann tíðliga í seinna hálvleiki skoraðið til 1-0 í venjingardystinum, sum londini spældu mikukvøldið. Brasil svaraði tó skjótt aftur við máli frá Daniel Carvalho, men javnleikurin kundi ikki krógva, at Noreg hevur takið á Brasil. Hetta er fjórða ferðin, at grannar okkara fyri eystan spæla móti fótbóltsstórveldinum, og enn hevur Noreg ikki tapt.

**-mørk**



## Dreymabyrjan hjá McLaren

Ongland vann ikki minni enn 4-0 á Grikkalandi, tá teir í gjár spældu fyrsta dystin undir leiðslu av Steve McLaren. Nýggi liðskiparin, John Terry skoraði fyrsta málið, áðrenn liðfelagi hansara í Chelsea, Frank Lampard, økti um leiðsluna. Tey bæði seinastu málini skoraði langi Liverpool-framherjin, Peter Crouch.

**-mørk**

Føroyar-Georgia 0-6 (0-3):

# Hava enn nógv at

**Drepandi effektivitetur í kontraspælinum frá Georgia køvdi allar føroyskar vónir um eitt bara sámuligt úrslit mikukvøldið. Meira enn nakað, so staðfesti stórtapið, at unga føroyska liðið enn hevur nógv at læra**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stórur partur av teimum 2.114 áskoðarunum á Svangaskarði sóu als ikki føroyska hæddarpunktið í dystinum móti Georgia. Klokkan var enn ikki farin um teir fyrstu fimm minuttirnar, áðrenn Føroyar høvdu fyrsta stóra møguleikan í dystinum. Rógvi Jacobsen var hægstur, tá hornaspark varð sent innfyri úr høgru, og við høvdinum stýrdi hann bóltinum niður til Christian Høgni Jacobsen. Runavíkingurin meddaði til, men ólukkutíð fór bólturin sendandi væl omanfyri.

Georgia tóktist so avgjørt at tosa við fyrstu løtuna, og Christian Høgni kom aftur í góða støðu stutt eftir, tá hann sneiddi mann av á baklinjuni. Flata sendingin út frá var tó ikki nóg neyv, og so fekk mótstøðuverjan eisini ruddað tann vandan av vegnum.

### Drepandi effektivir

Hendan løtan tóktist avgjørt benda tann vegin, at føroysku áskoðararnir væl kundu verða vitni til eitt heilt gott fótbóltskvøld, har »nýggja« føroyska landsliðið veruliga skuldi prógva sítt virði.

Samstundis, so lúrdi tann eystureuropeiski vandin tó støðugt í bakhøvdinum. Balkan-sjúkan hava vit onkra tíð rópt tað á hesum síðum, og tó at Georgia ikki heilt hoyrir heima á balkan, so hava tey í nógvar mátar somu fortreytir fyri fótbóltsspælinum.

Tað vil siga, at spælararnir eru vanir við hitastig, har tað er ógjørligt at trýsta í 90 minuttir, og at spælararnir tí velja at spæla spælið nakað øðrvísi. Og tað júst á ein slíkan hátt, sum so avgjørt ikki hóskar tí føroyska liðnum. Hetta tí brádliga temposkiftini altíð hava tað við at taka okkara spælarar á bóli.

Og tað var sum so júst eisini tað, sum hendi. Sami Christian Høgni, sum hótti so væl fyrstu løtuna, átti skeivu sendingina, sum setti gongd á fyrsta mótstøðumálið. Í teirri støðuni var uppbakningurin á føroyska miðvøllinum heldur ikki í lagi, og so var lag á manni hjá Mudjiri at draga tvær ferðir, áðrenn hann við dómadagsskoti sendi bóltin í meskarnar.

Og náðisleysa revsingin var tað, sum Føroyar fyrst og fremst kendu sviðan av. Trý av málunum vóru beinleiðis avleiðing av føroyskum mistøkum í uppspælinum, og so gekk tað við fullari ferð hinvegin. Tvær ferðir kiksaði annars væl kenda føroyska rangstøðufellan, og einsamallir við málverjanum vóru mótstøðumenninir ískaldir.



*Tvær ferðir hótti føroyska liðið av álvara fyrstu løtuna. Í báðum førum við Christian Høgna Jacobsen, men sami maður var tó eisini tann, sum setti fyrsta drepandi mótálopið ígongd*

*Mynd: Álvur*

## FAKTA UM MÁLINI

**0-1: Jaba Kankava, 16. min**
Christian Høgni Jacobsen mistekur seg á miðvøllinum. Kankava fær fatur á bóltinum, og tá eingin bakkar upp, setir hann beina kós móti málinum. Og úr 17 metrum høggur hann eitt fantastiskt skot móti málinum.

**0-2: Alexander Iashvili, 18.**
Bólturin er ikki meira enn givin upp, so er aftur galið. Føroyar rangstøðufellan kiksar, og so er Gogita Gogua púra leysur. Sendingin tvøtur um hálvkiksar, men tá Óli ikki fær ruddað burtur, er Iashvili skjótur at senda í meskarnar.

**0-3: Shota Arveladze, 36.**
Hesa ferð sendir Gogua eitt sera gott innlegg úr vinstru. Skrúvan á bóltinum er somikið stór, at Jákup Mikkelsen fer ikki út eftir honum, og so kann toppskjúttin hjá Georgia beina í málið úr stuttari fjarstøðu.

**0-4: Levan Kobiashvili (pen), 49.**
Júst innkomin sendir Hans Pauli Samuelsen eitt ikki serliga gott fríspark innfyri. Georgia fer í skjótt kontra, og tað endar við, at Atli Danielsen – heldur óneyðugt – fellur Arvaladze. Brotssparkið sendir Kobiashvili mitt í málið til 4-0.

**0-5: Shota Arveladze, 59.**
Eitt tekniskt sera vakurt mál av Arveladze, tá hann við uttarsíðuni heilflutkar innlegg frá Demetradze upp undir nettakið.

**0-6: Shota Arveladze, 80.**
Pauli Hansen mistekur seg á miðvøllinum, og við skjótum spæli er Arveladze brádliga púrasta leysur. Einsamallur við Jákupi er hann ískaldur. Fintar málverjan til viks og leggur bóltin í manntóma málið. Game, set and match Georgia.

## FAKTA

### 13. stórtapið

Sæð í mund til fyrstu árini, so er tað vorðið longur ímillum veruliga avsmurningarnar hjá føroyska fótbóltslandsliðnum. Soleiðis var tapið mikukvøldið tað 13. í røðini av tapum, sum hava verið í minsta lagi fimm mál. Av hesum hava tey sjey verið innan fyri fyrstu fimm árini í altjóða undankapping, meðan tað seinni hevur verið longur ímillum hesi. Dystirnir, sum talan hevur verið um, eru kanska skjótari gloymdir enn teir, har vit hava fingið góð úrslit. Men her eru so tey 13 úrslitini, har hetta er komið fyri.

| Dagur | Dystur | Úrslit |
|---|---|---|
| 01.05.91 | Jugoslavia-Føroyar | 7-0 |
| 11.09.91 | Føroyar-Norðurírland | 0-5 |
| 06.05.92 | Rumenia-Føroyar | 7-0 |
| 09.09.92 | Wales-Føroyar | 6-0 |
| 11.08.93 | Føroyar-Noreg | 0-7 |
| 16.11.94 | Finnland-Føroyar | 5-0 |
| 15.11.95 | Grikkaland-Føroyar | 5-0 |
| 06.10.96 | Føroyar-Jugoslavia | 1-8 |
| 04.06.98 | Estland-Føroyar | 5-0 |
| 06.06.01 | Føroyar-Jugoslavia | 0-6 |
| 21.02.04 | Føroyar-Póland | 0-6 |
| 04.09.04 | Sveis-Føroyar | 6-0 |
| 16.08.06 | Føroyar-Georgia | 0-6 |